# Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 19

ISSN 0907-905X

Nr. 55 26. mai 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum**
**(Yvirtøka av málsøkinum loðslógarøki)**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 7 frá 17. februar 2010, verður § 1, stk. 2, nr. 18 orðað soleiðis:
„18) Sjórættur, sjóuppmerking og vitaverk.“

**§ 2**

Løgtingslógin kemur í gildi 1. august 2011.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 189/2010

Nr. 56 26. mai 2011

**Løgtingslóg
um
Ferðaráð Føroya**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Uppgávurnar hjá Ferðaráði Føroya eru at menna Føroyar sum ferðamannaland og at kunna um og marknaðarføra Føroyar sum ferðamál.

**§ 2.** Landsstýrismaðurin skipar eitt ráð - Ráðið fyri Ferðaráð Føroya -, sum í øllum lutum er ráðgevandi mótvegis landsstýrismanninum og Ferðaráðnum.
*Stk. 2.* Ráðið hevur 6 limir, ið verða tilnevndir av landsstýrismanninum. Hesir umboða ávikavist:
ferðasmiðir,
ferðaflutningsvinnuna,
gistingarhús- og matstovuvinnuna,
økisferðavinnufeløgini,
mentamál og vinnumál.
*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin.
*Stk. 4.* Ráðslimirnir verða valdir fyri 4 ár.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin kann seta stjóra fyri Ferðaráð Føroya eftir tilmæli frá ráðnum. Stjórin er skrivari hjá ráðnum.

**§ 4.** Ferðaráð Føroya kann í samstarvi við kommunur og lokalu vinnuna stuðla økisferðavinnufeløgunum fíggjarliga. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um treytir fyri, at økisferðavinnufeløgini kunnu fáa stuðul.

**§ 5.** Ferðaráð Føroya ger á hvørjum ári ársfrágreiðing um virki Ferðaráðsins, sum verður send landsstýrismanninum.

**§ 6.** Landsstýrismaðurin ger eftir uppskoti frá ráðnum og stjóranum fyri Ferðaráð Føroya reglugerðir fyri stovnin og ráðið.

**§ 7.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2011.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 181/2010

## Løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 8. desember 2010, sum rættað við kunngerð nr. 119 frá 17. des. 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9 verður stk. 4 strikað.

2) Í § 40 verður sum stk. 4 sett:
„*Stk. 4.* Kommunurnar afturrinda til landskassan tær útreiðslur, ið standast av, at Almannastovan veitir fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing. Almannastovan krevur umvegis TAKS peningin innaftur frá kommununum.“

3) Í § 40 verður sum stk. 5 sett:
„*Stk. 5.* Kommunurnar afturrinda landskassanum útreiðslurnar til náttarvakt á eldrasambýlum.“

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 159/2010

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 44 verður orðað soleiðis:
„**§ 44.** Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við bót, sum
   1) brýtur § 7, stk. 1, § 8, stk. 1, § 13, stk. 1, § 14, stk. 1 og 2, § 17, § 21, stk. 1 og § 25, stk. 1,
   2) setur treytir sambært § 18, stk. 2 og § 25, stk. 2 til viks,
   3) ikki letur inn fráboðan sambært § 26, stk. 1-2, ella upplýsingar sambært § 26, stk. 3,
   4) ikki fylgir banni ella boðum sambært § 31, stk. 1-2, ella banni sambært § 32, stk. 1 og 2,
   5) forðar kanningum sambært § 30, stk. 1 og 2, ella eftirliti sambært § 34, stk. 1 og 2, ella
   6) forðar fyri, at skip verður hildið aftur sambært § 33, stk. 2.
*Stk. 2.* Ásetan av bót fyri brot á § 7, stk. 1 og 2 skal hava støði í tí nøgd av olju, ið er burturbeind.
*Stk. 3.* Revsingin kann hækka til fongsul í upp til 2 ár, um brotið er framt við vilja ella við grovum ósketni, og um tað við brotinum er
   1) voldur skaði á umhvørvið, ella elvt er til vanda fyri slíkum skaða, ella
   2) peningaligur fyrimunur er fingin, ella tílíkur fyrimunur hevur verið tilætlaður fyri viðkomandi sjálvan ella onnur, eitt nú við sparingum.
*Stk. 4.* Reglurnar í stk. 3 eru ikki galdandi fyri brot, framd av útlendskum skipum. Fyri brot, framd av útlendskum skipum, kann revsingin hækka til fongsul í 2 ár, um brotið er framt á sjóumveldinum, og dálkingin er álvarsom og framd við vilja.“

2) § 46, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Stk. 1 verður samsvarandi nýtt í málum um brot á fráboðanarskylduna sambært § 26 og í málum um brot á reglur, ásettar sambært § 19 viðvíkjandi burturbeining av olju frá havstøðum.“

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 154/2010

Nr. 59 26. mai 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**at nýta part av stovnsfænum hjá Vinnuframagrunninum at innrætta høli til granskarasetur**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Vinnuframagrunnurin verður niðurkapitaliseraður við upp til 10 mió. kr., og verður upphæddin nýtt at inrætta kanningarstovur og onnur høli til granskarasetur.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 87/2010

Nr. 60 26. mai 2011

# Løgtingslóg um stuðul til Saltsilogrunnin

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1 Stuðul

**§ 1.** Løgtingið heimilar landsstýrinum at veita stuðul upp á 20 mió. kr. í 2011 at útgjalda samsvarandi byggigongdini til Saltsilogrunnin til at umbyggja og innrætta Saltsiloina á Drelnesi til mentanarhús.

## Kapittul 2 Eftirlit og umsjón

**§ 2.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit og umsjón viðvíkjandi stuðlinum til Saltsilogrunnin.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skal støðugt hava eftirlit við, at Saltsilogrunnurin alla tíðina lýkur treytirnar, sum settar eru í sambandi við at veita stuðulin, herundir at halda ásetingarnar í viðtøkunum. Landsstýrismaðurin skal harumframt tryggja, at hann fær at vita um týðandi upplýsingar um møguligt óreglusemi, munandi frávik í mun til fíggjarætlan og møguligar fíggjarligar trupulleikar, og skal somuleiðis verða til reiðar í neyðugan mun at leggja uppí, um umstøðurnar krevja tað.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin skal ganga ígjøgnum roknskap, grannskoðanarprotokol, upplýsingar um virksemið, ársfrágreiðingar o.t. Eftirlitið skal m.a. vera:
1) Meta, um treytirnar fyri stuðlinum eru loknar fult út í tíðarskeiðinum.
2) Samanbera roknskap og fíggjarætlan og fáa greiðu á munandi frávikum.
3) Samanbera ætlað og gjørd arbeiði og fáa greiðu á munandi frávikum.

## Kapittul 2 Broytingar í viðtøkum

**§ 3.** Landsstýrismaðurin skal góðkenna broytingar í viðtøkunum fyri Saltsilogrunnin.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skal hava heimild at tilnevna ein av nevndarlimunum í Saltsilogrunninum.

## Kapittul 3 Roknskapur og grannskoðan

**§ 4.** Hesar reglur eru galdandi fyri roknskapin fyri Saltsilogrunnin:
1) Roknskapurin skal hava ein fastan kontuplan, sum er býttur sundur í slag og/ella endamál.
2) Roknskapurin skal vísa, at stuðulin er førdur sum inntøka.
3) Roknskapurin skal fata um rakstrarroknskap fyri allar inntøkur og útreiðslur, greinaðar sundur út frá kontuplani, herundir avskrivingar og burturleggingar, umframt javnvágaruppgerð yvir stutt- og langfreistaða ogn og skuld, herundir uppgerð av eginpeninginum.
4) Umframt roknskapin skal gerast frágreiðing um, hvussu stuðulin verður nýttur.

**§ 5.** Roknskapurin hjá Saltsilogrunninum skal verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara sambært hesum reglum:
1) Grannskoðanin skal verða gjørd sambært góðum grannskoðarasiði.
2) Undir grannskoðanini skal verða staðfest, um roknskapurin er rættur, og um tær atgerðir, sum eru umfataðar av roknskapinum, samsvara givnum játtanum, lógum og øðrum forskriftum, umframt gjørdum avtalum og vanligari siðvenju.
3) Saltsilogrunnurin skal geva grannskoðaranum tær upplýsingar, sum grannskoðarin heldur hava týdning fyri at meta um roknskapin, og skal geva grannskoðaranum atgongd til at gera tær kanningar, sum grannskoðarin metir vera neyðugar, og skal syrgja fyri, at grannskoðarin fær tær upplýsingar og ta hjálp, sum grannskoðarin metir vera neyðugar fyri at kunna gera sítt arbeiði.
4) Verður grannskoðarin varugur við lógarbrot, skal grannskoðarin beinanvegin geva Saltsilogrunninum boð um hetta og síggja til, at Saltsilogrunnurin innan 3 vikur gevur landsstýrismanninum boð um hetta. Um ikki, skal grannskoðarin boða landsstýrismanninum frá hesum.
5) Grannskoðarin førir grannskoðanarprotokol, har grannskoðarin greiðir frá gjørdum grannskoðanararbeiði umframt øllum munandi viðurskiftum, sum hava givið høvi til viðmerkingar. Somuleiðis verða upplýsingar um serlig eftirlitsarbeiði, serligar frágreiðingar, ráðgeving og hjálp førdar í grannskoðanarprotokollina.
6) Grannskoðaði roknskapurin fær eina átekning, sum vísir, at roknskapurin er grannskoðaður sambært hesum reglum. Fyrivarni skulu síggjast í átekningini.
7) Saltsilogrunnurin skal árliga lata landsstýrismanninum avrit av grannskoðanarprotokollini saman við áteknaða ársroknskapinum.

## Kapittul 4 Játtanin dettur burtur – stuðulin gjaldast aftur

**§ 6.** Givnar játtanir kunnu detta burtur, og útgoldin stuðul kann verða kravdur goldin aftur, um Saltsilogrunnurin ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa

stuðul ella ikki er førur fyri at fremja sítt virksemi á nøktandi hátt.

### Kapittul 5
### Upplýsingarskylda og atgongd til at síggja og kanna roknskapartilfar

**§ 7.** Saltsilogrunnurin skal upplýsa um, at treytirnar fyri stuðlinum verða loknar.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin hevur atgongd til at síggja og kanna roknskap og annað roknskapartilfar umframt atgongd til at staðfesta, at ognirnar eru til, og at virksemið er framt.

### Kapittul 6
### Gildiskoma

**§ 8.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 174/2010

# Eykajáttanarløgtingslóg fyri mars 2011-3

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## § 3. Fíggjarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 20.000 | 20.000 | - |
| Løguætlan | - | - | - |
| **Mentan** | | **20.000** | **-** |
| 3.24.3. ........................................................ | | 20.000 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|---|
| | | | | - Tús. kr. - |
| **3.24.3.** | | | | |
| 24.3.26. | Saltsiloin á Drelnese (Stuðulsj.) | J: | - | - |
| | | **EYJ:** | **20.000** | **-** |

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 183/2010

# Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 30. mars 2004, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3 verður sum stk. 5 sett:
„*Stk. 5*. Dagpeningur kann somuleiðis verða veittur til foreldur, sum eru heima hjá sjúkum barni á barnsins fyrsta og øðrum sjúkradegi, um barnið er undir 14 ár. Hvørt av foreldrunum kann, sambært hesum stykki, í mesta lagi fáa dagpening í 10 dagar um árið.“

2) Í § 23 verður sum stk. 3 sett:
„*Stk. 3*. Verður óarbeiðsføri staðfest sambært § 3, stk. 5, er váttan frá arbeiðsgevara javnsett við læknaváttan.“

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 63/2010

Nr. 63 26. mai 2011

# Løgtingslóg
# um
# at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1
## Lógarøki

**§ 1.** Eftir hesi lóg er mismunur allur beinleiðis ella óbeinleiðis mismunur orsakað av breki.
*Stk. 2.* Beinleiðis mismunur verður framdur, tá persónur orsakað av breki verður viðgjørdur verri enn ein annar verður, hevur verið ella hevði verið viðgjørdur í samsvarandi støðu.
*Stk. 3.* Óbeinleiðis mismunur verður framdur, tá ein áseting, eyðkenni, ella siðvenja, sum at vísa seg er neutral, hevur við sær, at persónur, ið ber brek, fær eina verri støðu enn aðrir, uttan so, at viðkomandi áseting, eyðkenni ella siðvenja er objektivt grundað á eitt sakligt endamál, og tiltøkini at røkka tí eru hóskandi og neyðug, sbr. tó § 3.
*Stk. 4.* Lógin verður ikki nýtt í tann mun, samsvarandi verja móti mismuni er ásett í sáttmála á arbeiðsmarknaðinum.

## Kapittul 2
## Bann móti mismuni

**§ 2.** Tað er ikki loyvt arbeiðsgevara at gera mismun á starvsfólki ella umsøkjarum til størv, sum eru leys, í sambandi við starvssetan, uppsøgn, starvsflyting, starvsuppflyting, ella viðvíkjandi lønar- og setanartreytum.
*Stk. 2.*Tað er mismunur viðvíkjandi lønartreytum, um tað ikki verður veitt sama løn fyri sama arbeiði, ella fyri arbeiði, sum hevur sama virði.
*Stk. 3.* Arbeiðstakari, ið ikki fær løn sambært 1. stk., skal hava útgoldið munin.

**§ 3.** Tað er ikki loyvt at lýsa við, at tað til setan í starv ella vinnuliga útbúgving verður søkt eftir persónum, ið bera brek, ella at persónar, ið bera brek, hava fyrimun. Tað er heldur ikki loyvt at lýsa við, at persónar, ið bera brek, ikki verða ynsktir.

**§ 4.** Ásetingar í einsæris avtalum ella sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum og í innanhýsis reglum hjá fyritøkum o.a., sum eru í ósamsvari við bannið móti mismuni í § 2, hava ikki gildi.

**§ 5.** Tað kann ikki verða vikið frá lógarinnar ásetingum til bága fyri arbeiðstakaran.

## Kapittul 3
## Samsýning, próvdøming o.a

**§ 6.** Persónar, hvørs rættindi eru sett til viks, við at brot brot er framt á § 2, kunnu fáa samsýning.
*Stk. 2.* Persónur, sum verður fyri ófyrimunaligari viðgerð ella ófyrimunaligum fylgjum, tí viðkomandi hevur sett fram krav um líka viðgerð eftir § 2, kann fáa samsýning.

**§ 7.** Brot á § 3 verður revsað við bót.
*Stk. 2.* Er brotið framt av einum felag, einum sjálvbeigandi stovni, grunni ella líknandi, kann bót verða áløgd tí juridiska persóninum sum slíkum revsiábyrgd. Er brotið framt av landinum, einari kommunu ella kommunalum felagsskapi, sum er fevndur av § 51 í kommunustýrislógini, kann revsiábyrgd verða áløgd landinum, kommununi ella kommunala felagsskapinum.

**§ 8.** Klagur um brot á bannið móti mismuni eftir hesi lóg og um brot á bannið móti revsiatgerðum í § 6, stk. 2 verða viðgjørdar av Javnstøðunevndini eftir løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn. Tá nevndin viðgerð klagur um brot á hesa lóg, verður nevndin umframt við teimum limum, sum nevndir eru í § 10 í javnstøðulógini, mannað við einum limi umboðandi Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum. Hesin nevndarlimurin, og varalimur fyri hann, verða valdir eftir reglunum í § 10 í javnstøðulógini.

## Kapittul 4
## Ígildiskoma

**§ 9.** Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 136/2010

Nr. 64 26. mai 2011

# Løgtingslóg um manntal í 2011

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Manntal skal haldast í Føroyum á heysti 2011.
*Stk. 2.* Endamálið er at gera eina neyva hagtalslýsing av føroyska samfelagnum.
*Stk. 3.* Manntal er skipað sum ein verkætlan undir Hagstovu Føroya, sum hevur ábyrgd av verkætlanini.

**§ 2.** Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð, nær og hvussu manntal verður hildið.

*Spurnablað*

**§ 3.** Hvørt húski og einstaklingur í Føroyum fær eitt spurnablað at svara. Í spurnablaðnum verður spurt um hesi evni:
1) Navn, kyn, aldur og p-tal.
2) Starv, útbúgving, vinna og arbeiði, arbeiðsumstøður og knýti til arbeiðsmarknaðin.
3) Uppihald í øðrum londum.
4) Trúgv og tilknýti til kristnar kirkur, fríkirkjur og samkomubólkar.
5) Almenna heilsustøðu, avmarking í dagligum virki orsakað av sjúku ella breki.
6) Ríkisborgaraskap, tjóðskap, føðistað, mál.
7) Bústaðir, slag av bústaði, lýsing av býli.
8) Lýsing av liviumstøðum í húskjunum og samansetingin av húskinum teljidagin.
9) Borgarastøðu, familjustøðu, hjúnalag, parlag, børn, foreldur, systkin.

*Stk. 2.* Felagsbýli fáa serligt spurnablað, har spurt verður um hesi evni:
1) Navn og p-tal hjá búfólkunum.
2) Slag av felagsbýli, lýsing av felagsbýli.
3) Tal á fólkum, sum gistu í felagsbýlinum teljináttina.

*Stk. 3.* Øll, sum búgva í Føroyum, hava skyldu at svara spurnablaðnum, men tað er sjálvboðið at svara spurningum sambært stk. 1, nr. 4. Avvarðandi, verji ella onnur svara fyri tey, sum ikki sjálvi eru før fyri at svara spurningunum.

*At góðkenna teljarar*

**§ 4.** Góðkendir teljarar verða brúktir at fremja manntalið.
*Stk. 2.* Hagstova Føroya góðkennir teljarar og útskrivar hesum váttan um góðkenning. Treytin at verða góðkendur sum teljari er, at viðkomandi er myndugur og verður mettur egnaður at vera teljari eftir neyðuga frálæru og uppvenjing, serliga í heimildum, rættindum og skyldum hjá ávíkavist myndugleikum og borgarum, eisini rættindi sambært mannarættindum og altjóða sáttmálum.
*Stk. 3.* Tulkar og onnur hjálparfólk í manntalinum skulu hava somu góðkenning.
*Stk. 4.* Góðkendur teljari hevur sambært leiðbeiningum:
1) Heimild at koma til dyrnar hjá privatum og á øðrum støðum, har fólk búgva ella uppihalda sær.
2) Heimild at biðja fólk svara upp á teir spurningar, sum eru í spurnarblaðnum.

*Stk. 5.* Teljari skal altíð vísa góðkenningarváttan sína í samskifti sambært stk. 4 og eftir umbøn.
*Stk. 6.* Hagstova Føroya skal fráboðað alment, hvør er góðkendur sum teljari.

**§ 5.** Góðkendir teljarar og onnur hjálparfólk í manntalinum hava tagnarskyldu um viðurskifti um einstaklingar, húski, býli, feløg, fyritøkur og stovnar, sum tey í starvi sínum fáa kunnleika um, bæði meðan tey arbeiða fyri Hagstovu Føroya og aftaná, at tey eru farin úr arbeiðnum. Teljari og onnur hjálparfólk skulu skrivliga vátta, at tey hava kunnað seg við ásetingarnar um tagnarskyldu og viðkomandi heimildir, rættindi og skyldur.

*Nýtsla av upplýsingum fingnar í manntalinum*

**§ 6.** Hagstova Føroya hevur ábyrgdina av, at hagtølini frá manntalinum verða tøk hjá øllum.
*Stk. 2.* Arbeiði við úrslitinum av manntalinum fylgir teimum lógum og reglum, sum Hagstova Føroya hevur skyldu at halda.
*Stk. 3.* Upplýsingar, sum Hagstova Føroya fær á manntalinum kunnu einans latast øðrum sum hagtøl, har eingin einstaklingur, býli ella húski kunnu kennast aftur.

**§ 7.** Upplýsingarnar á manntalinum eru ogn hjá landinum, og Hagstova Føroya hevur landsins vegna ábyrgdina av, at spurnabløðini eru í tryggari varðveitslu, til viðgerðin er liðug.
*Stk. 2.* Aftaná, at upplýsingarnar frá manntalinum eru talgildar, verða spurnabløðini latin Landsskjalasavninum í varðveitslu. Atgeingið er vart sambært ásetingum í lóg um Føroya Landsskjalasavn.

*Revsing, gildiskoma o.a.*

**§ 8.** Er ikki harðari revsing uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við bót revsaður tann, sum brýtur tagnarskylduna í § 5.
*Stk. 2.* Tann, sum brýtur grein 3, stk 3, við vilja ella av grovum ósketni, kann verða revsaður við bót.
*Stk. 3.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Stk. 4.* Í reglum, ið verða givnar sambært lógini, kann revsing verða ásett við bót fyri brot á reglurnar ella treytir, ið verða givnar sambært reglunum.

**§ 9.** Landskassin rindar útreiðslurnar fyri manntalið.

**§ 10.** Hendan løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 115/2010

Nr. 65 26. mai 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**rættarskipanarnevnd**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Sett verður rættarskipanarnevnd at gera uppskot til grundleggjandi rættargangslóg fyri Føroyar og uppskot til føroyska revsilóg.
*Stk. 2.* Rættarskipanarnevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til rættarskipan í seinasta lagi 30. november 2012 umframt ávegisábøtur á revsilóg innan 30. november 2011. Tilmæli nevndarinnar skal fevna um bæði dagført uppskot um rættargangslóg (lov for Færøerne om rettens pleje) og um ætlan fyri yvirtøku av málsøkinum og stovnan av føroyskum dómstólum og fullfíggjað revsilógarverk fyri Føroyar.

**§ 2.** Í rættarskipanarnevndini sita fimm fólk við samfelagsvísindaligari útbúgving. Løgmaður velur limirnar eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum (tveir), advokatfelag Føroya (tveir) og búskapar- og løgfrøðingafelagnum (ein). Nevndin skipar seg sjálv.
*Stk. 2.* Politiskur fylgibólkur verður valdur við einum limi úr hvørjum flokki á tingi umframt møguligum uttanflokkatingmonnum. Flokkarnir kunnu velja tingfólk ella landsstýrisfólk; flokkarnir kunnu velja lim sín av nýggjum.

**§ 3.** Landsstýrismaður veitir nevndini skrivstovuhjálp, ið skipast skal sum tænastuavtala við Fróðskaparsetrið ella annan granskingarstovn.
*Stk. 2.* Nevndin útgreinar arbeiðssetningin eftir tilmæli frá formanninum. Nevndin kann umframt taka upp evni eftir egnari meting, eins og allir limir eiga rætt at fáa sína hugsan við í álit og frágreiðingar hjá nevndini.
*Stk. 3.* Er helmingurin av limunum møttur á fundi, kann nevndin taka støðu. Skal nevndin atkvøða um støðu sína, ræður vanligur meiriluti. Stendur á jøvnum, ræður formaðurin.

**§ 4.** Meðan nevndin arbeiðir, skipar hon fyri at kunna og hoyra føroyska fólkið.
*Stk. 2.* At tryggja innlit og ávirkan fólksins skal nevndin lata landsstýrinum fyribils álit og uppskot til dagførda rættargangslóg. Nevndin skipar síðani fyri hoyringum, har fólk og áhugabólkar fáa høvi at ummæla arbeiðið hjá rættarskipanarnevndini. Rættarskipanarnevndin skipar somuleiðis fyri evnisfundum um innihaldsligar partar av uppskotinum.

**§ 5.** Landskassin rindar eftir játtan kostnaðin av nevndararbeiðinum og øðrum tiltøkum eftir hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í reglugerð nærri um samsýning.

**§ 6.** Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 79/2010

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 29. apríl 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, stk. 1, síðsta pkt. verður strikað, og í staðin verður sett:
„Peningur á festikontu og felags festipulju er partur av fæi grunsins."

2) § 5 verður orðað soleiðis:
„**§ 5.** Tá føst ogn hjá landinum, sum hoyrir til eitt festi, verður seld, skal ágóðin av søluni flytast Búnaðargrunninum og verða bókað á kontu hjá avvarðandi festi.
*Stk. 2.* Helvtin av upphæddum, ið verða goldnar inn á eina festikontu, verður flutt við eins stórum upphæddum við ársenda tað árið, upphæddin er inngoldin, og 9 næstkomandi ár á eina felags festipulju.
*Stk. 3.* Helvtin av teirri upphædd, ið stendur á hvørjari einstakari festikontu, tá lógin kemur í gildi, verður flutt við eins stórum upphæddum, tá lógin kemur í gildi, og 9 næstkomandi árini á tað í stk. 2 nevndu felags festipulju.
*Stk. 4.* Verður tann í stk. 2 og 3 nevnda upphædd broytt vegna útgjald, verður árliga upphæddin, ið verður flutt á felags festipulju, minkað samsvarandi restina av tíðarskeiðinum.
*Stk. 5.* Upphæddin, ið stendur á festikontu hjá Royndarstøðini (Búnaðarstovan) í Kollafirði, er ikki fevnd av stk. 2 og 3.
*Stk. 6.* Helvtin av upphæddini á festikontuni hjá Royndarstøðini í Hoyvík skal bókast inn á eina felags festipulju, sum verður fevnd av reglunum sambært stk. 2 og 3."

3) Aftan á Kapittul 3 verður sum nýggjur kapittul settur:

**„Kapittul 3 a**
**Fígging av festikontu og felags festipulju**

**§ 10 a.** Búnaðargrunnurin kann játta festum heila ella lutvísa fígging av festikontu til ætlanir, sum hava til endamáls at skapa varandi virðisøking av festinum, t.d. fyri at viga upp ímóti avleiðingum av sølu av fastari ogn burtur av festinum. Fíggingin kann verða veitt til
1) keyp av búnaðarjørð,
2) ábøtur, velting og nýdyrking av búnaðarjørð, brunnar, køstar og vegagerð í hesum sambandi, og
3) seyðahús, rættir og fjós. Til hesi endamál kann verða játtað upp til 50% av samlaða íløgukostnaðinum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri at veita fígging av festikontu.

**§ 10 b.** Búnaðargrunnurin kann veita festarum fígging av felags festipulju til ætlanir, ið hava til endamáls at skapa varandi virðisøking av festinum. Fíggingin kann verða veitt til
1) keyp av búnaðarjørð og
2) ábøtur, velting og nýdyrking av búnaðarjørð, brunnar, køstar og vegagerð í hesum sambandi.
*Stk. 2.* Búnaðargrunnurin kann veita lán ella stuðul av felags festipulju til tiltøk og ætlanir, ið hava til endamáls at menna landbúnaðin í Føroyum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri at veita fígging av felags festipulju."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 152/2010

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 4 verður sett sum nýtt stk. 2:
„*Stk. 2.* kommunur ella skúlasambond, sum hava 120 ella fleiri næmingar í 10. flokki, kunnu við góðkenning landsstýrismansins skipa ein felags 10. floks skúla við sjálvstøðugari leiðslu fyri allar 10. floks næmingarnar í kommununi ella skúlasamstarvinum. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri víkja frá ásetta næmingtalinum“ Stk. 2 verður hereftir stk. 4.

2) Í § 4 verður sett nýtt stk. 3:
„*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um at skipa felags 10. floks skúla.” Stk. 3 verður hereftir stk. 5, stk. 4 verður stk. 6, stk. 5 verður stk. 7, stk. 6 verður stk. 8, stk. 7 verður stk. 9 og stk. 8 verður hereftir stk. 10.

3) Í § 14, stk. 9 verður “royndarlærugreinunum, sbr. § 16, stk. 1-6 lýst við talmetum (støðumetum)” broytt til: “próvtøkulærugreinunum, sbr. § 16, stk. 1-8 lýst við talmetum“.

4) § 16, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 1.* Undirvísingin í 9. og 10. flokki endar við próvtøku í kravdum lærugreinum og vallærugreinum.“

5) § 16, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur fyri próvtøkur í 9. og 10. flokki, herímillum um próvtøkulærugreinir, próvtøkukrøv í einstøku lærugreinunum, próvtøkuhald, próvdøming, próvtøl, ársmet, eftirmeting og, hvussu próvtøkuskjølini skulu vera.“

6) § 16, stk. 4 verður strikað. Stk. 5 verður hereftir stk. 4, og stk. 6 verður hereftir stk. 5.

7) § 16, stk. 7 verður strikað.

8) § 16, stk. 8 verður hereftir stk. 6 og verður orðað soleiðis:
„*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin setur tær skrivligu próvtøkuuppgávurnar, og lærarin setur munnligu próvtøkuuppgávurnar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur.“

9) § 16, stk. 9 verður hereftir stk. 7 og verður eftir „sbr. tó“, sett „stk. 5“.

10) § 17, stk.1 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 1.* Skúli kann gera frávik frá próvtøkureglunum fyri næmingar við serligum tørvi og fyri fremmandamæltar næmingar. Landsstýrismaðurin kann áseta gjøllari reglur hesum viðvíkjandi.“

11) § 17, stk. 2 verður strikað.

12) § 23, stk. 4 verður strikað.

13) § 30, stk. 3 verður strikað, og stk. 4 verður hereftir stk. 3.

14) Í § 32 verður sett sum nýtt stk. 3:
„*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í samstarvi við kommunurnar skipa samstarv millum 10. flokkar í fleiri kommunum.“

15) Í § 32 verður sett sum nýtt stk. 4:
„*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur í samstarvi við kommunurnar gjøllari reglur um samstarvið millum 10. flokkar í fleiri kommunum.“

16) § 35, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 1.* Til at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum skal viðkomandi hava lokið útbúgvingina sum fólkaskúlalærari á Føroya Læraraskúla, Fróðskaparsetri Føroya ella donskum læraraskúla sbr. stk. 2-5 ella aðra læraraútbúgving á sama støði, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent.“

17) § 47, stk. 6 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 6.* Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5.“

18) § 52, stk. 4 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 4.* Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6.“

19) Í § 57, stk. 10 verður „royndi“ broytt til: „royndir“.

20) Í § 57 verður sett sum nýtt stk. 12:
„*Stk. 12.* Landsstýrismanninum verður heimilað at góðkenna, at kommunur við eini royndar- og menningarskipan skipa skúlasamstarv millum kommunur og í kommunum, ið hava fleiri skúlar, til tess at gagnnýta verandi játtan betur til frama fyri næmingar, lærarar og avvarðandi kommunur.“

21) Í § 57 verður sett sum nýtt stk. 13:
„*Stk. 13.* Landsstýrismaðurin ger av í samráð við kommunurnar, at játtan, ið verður tøk eftir bygnaðarbroytingarnar sbrt. § 57, stk. 11, verður í mest møguligan mun nýtt til royndar-, menningar- og granskingarverkætlanir, eftirútbúgving av lærarum og skúlaleiðarum umframt til møguligan meirkostnað hjá kommunum í skúlasamstarvinum.“

## § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Tó fáa ásetingarnar í § 1. nr. 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, 11 og 12 gildi 1. august 2011.

Tórshavn, 26. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 148/2010

Nr. 68 27. mai 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**tyrlutænastu**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera ein 4 ára sáttmála um veitan av tyrlutænastu. Játtanin verður at veita yvir árligu fíggjarløgtingslógirnar.
*Stk. 2.* Tyrlutænastan skal fevna um tvær tyrlur til hesar tænastur:
1) innanoyggja flúgving
2) leiting og bjarging á sjónum
3) leiting og bjarging á landi
4) bráðfeingis sjúkraflutning
5) vanligan sjúkraflutning
6) eftirlitsflúgving í sambandi við oljudálking
7) eftirlitsflúgving í sambandi við fiskiveiðieftirlit
8) aðra bráðfeingis tyrluflúgving, har tørvur er á skjótari hjálp.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 127 frá 22. desember 2000 um tyrlutænastu.

Tórshavn, 27. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 118/2010

**Løgtingslóg um at broyta ársroknskaparlógina, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, grannskoðaralógina og tryggingarlógina (fylgibroytingar til vinnufelagslógina)**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í kongligari fyriskipan nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, sum broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 2, 2. pkt. verður „lov om aktieselskaber som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning, lov om anpartsselskaber som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „vinnufelagslógin“.

2) § 7, stk. 1, nr. 4 verður „Aktieselskaber, der følger reglerne for statslige aktieselskaber, jf. § 2 a, stk. 2 i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „Partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, sbr. § 303 í vinnufelagslógini“ og eftir „afsnit V“ sett: „sbr. tó § 7 a.“.

3) Í § 7, stk. 3, nr. 3 verður „§ 178 i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „§ 143 í vinnufelagslógini“.

4) Eftir § 7 verður sett í kapittul 1:
„*Undantøk fyri dótturfeløg hjá landspartafeløgum*
**§ 7 a.** Serligu reglurnar í hesi lóg fyri landspartafeløg verða ikki nýttar fyri dótturfeløg hjá landspartafeløgum.“

5) § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 8.** Felagsins leiðsla, jvb. skjal 1, A, nr. 5, skal lata ársfrásøgn fyri virkið.“

6) Í § 8, stk. 2, 1. pkt. verður „pågældende“ broytt til: „ábyrgu“.

7) Í § 9, stk. 2 verður „almenn partafeløg“ broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, sbr. § 303 í vinnufelagslógini“.

8) Í § 15, stk. 4, 2. pkt. verður „aktieselskaber, der følger reglerne for statslige aktieselskaber, jf. § 2 a, stk. 2, i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb. § 303 í vinnufelagslógini“.

9) § 35 verður strikað.

10) Eftir § 35, sum verður strikað, verður sett:
„**§ 35 a.** Parta- og smápartafeløg og partnarafeløg, ið veita lán, trygd ella aðra fíggjarliga hjálp sambært § 206, stk. 2 og § 214, stk. 1 í vinnufelagslógini, skulu umflokka eina upphædd samsvarandi við lánið, trygdina ella ta fíggjarligu hjálpina frá postinum Flutt yvirskot, ella øðrum posti undir eginognini, ið kann verða nýttur til vinningsbýti, til postin Tiltøkupeningur fyri lánum og trygdum. Hesin tiltøkupeningurin kann ikki eliminerast við virkisins undirskoti ella verða minkaður á annan hátt. Tiltøkupeningurin skal tó minkast ella strikast í tann mun, lánið, trygdin ella fíggjarligi studningurin verður minkaður ella verður fingin av vegnum.
*Stk. 2.* Trygd, sum er veitt í stríð við §§ 206 og 210 í vinnufelagslógini, er fevnd av stk. 1, um so er, at trygdarveitingin er bindandi fyri felagið, jvb § 215, stk. 3 í vinnufelagslógini.

**§ 35 b**. Parta- og smápartafeløg og partnarafeløg**,** har tann teknaði virkiskapitalurin ikki er inngoldin til fulnar, skulu
1) rokna virkiskapital, sum ikki er inngoldin til fulnar, uppí sum ágóða, jvb. allýsingina av ogn í fylgiskjali 1, C, nr. 1, sbr. stk. 2, ella
2) uttan mun til allýsingina av ogn í fylgiskjali 1, C, nr. 1 týðiliga draga frá eina upphædd samsvarandi við virkiskapital, sum ikki er inngoldin til fulnar, undir virkiskapitalinum, jvb. stk. 3.

*Stk. 2.* Við bruttopresentasjón, smr. stk. 1, nr. 1, skal virkið umflokka eina upphædd samsvarandi við ikki inngoldnan virkiskapital frá postinum Flutt yvirskot ella einum øðrum posti, ið kann brúkast til vinningsbýti undir eginognini, til postin Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan virkiskapital. Hesin tiltakspeningurin kann ikki eliminerast við virkisins undirskoti ella minkast á annan hátt.Tó skal tiltakspeningurin strikast ella minkast í tann mun, virkiskapitalurin verður inngoldin til virkið.
*Stk. 3.* Við nettopresentasjón, jvb. stk. 1, nr. 2, skal virkið umflokka eina upphædd samsvarandi við ikki inngoldnan virkiskapital frá postinum Flutt yvirskot ella einum øðrum posti, ið ikki kann brúkast til vinningsbýti undir eginognini, til postin Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan virkiskapital. Hesin tiltakspeningur kann ikki eliminerast við virkisins undirskoti ella minkast á annan hátt. Tó skal tiltakspeningurin strikast ella minkast í tann mun, virkiskapitalurin verður inngoldin til fyritøkuna.“

11) Eftir § 51, stk. 2 verður sett:
„*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur, ið víkja frá stk. 1 og 2, fyri virki, sum áður hava latið ársfrásøgn eftir einum øðrum regluverki enn hesari lóg í tann mun, tað er neyðugt til tess at lætta umskifti til nýtsluna av hesi lóg."

12) § 74 verður strikað.

13) Í § 102 verður nýtt stykki sett inn eftir stk. 1:
„*Stk. 2.* Partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, sbr. § 303 í vinnufelagslógini, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, skulu fylgja reglunum fyri virki, sum hava virðisbrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi, tá hesar reglur víkja frá reglunum í hesi lóg viðvíkjandi landspartafeløgum."
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.

14) Í § 106 a, stk. 2 verður „bestyrelse og" broytt til: „virkisins".

15) § 107, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„Upplýsast skal um tey leiðslustørv, sum limir í leiðsluni hava í øðrum vinnurekandi virkjum, undantikið teimun dótturfeløgum, sum partafelagið eigur 100 prosent. Er viðkomandi bæði limur í leiðsluni hjá einum øðrum móðurfelagi og í einum ella fleiri av tess dótturfeløgum, sum móðurfelagið eigur 100 prosent, er tað uttan mun til 1. pkt. nóg mikið at upplýsa navnið á móðurfelagnum og talið av tess dótturfeløgunum, har viðkomandi er limur í leiðsluni."

16) Í § 107 a, stk. 1, nr. 3 verður „bestyrelse" broytt til: „evstu leiðslu".

17) § 107 a, stk. 1, nr. 4 verður orðað soleiðis:
„4) Heimildir hjá leiðsluni, serliga viðvíkjandi møguleikanum fyri at geva partabrøv út, jvb. § 155 í vinnufelagslógini, ella fyri at ogna sær egin partabrøv, jvb. § 198 í vinnufelagslógini."

18) Í § 107 c, stk. 1 verður „Almenn partafeløg, t.e. partafeløg, ið eru fevnd av reglum, settum sbrt. § 2 a í partafelagslógini", broytt til: „Partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb. § 303 í vinnufelagslógini", og orðini „og sum ikki hava virðisbrøv, ið eru upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi" verða strikað.

19) Í § 107 c, stk. 2, 1. pkt. verður „almenn partafeløg" broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, smb. § 303 í vinnufelagslógini", og orðini „sum ikki hava virðisbrøv upptikin til handil á einum reguleraðum marknaði í einum ES/EBS-landi" verða strikað.

20) § 107 c, stk. 3 verður strikað.

21) Yvirskriftin framman fyri § 108 verður orðað soleiðis:
*„Serligar reglur fyri partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg".*

22) Í § 108 verður „Har Erhvervs- og Selskabsstyrelsen i medfør af § 2 a, stk. 2 i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning fastsat regler om, at visse aktieselskaber skal følge reglerne for statslige aktieselskaber, kan styrelsen" broytt til: „Landsstýrismaðurin kann seta ásetingar, sum undantaka frá teimum serligu reglunum, ið galda fyri partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, sbr.§ 303 í vinnufelagslógini".

23) Í § 128, stk. 4, 1. pkt. verður „§ 102, stk. 2" broytt til: „§ 102, stk. 3", og í stk. 4, 3. pkt. verður „almenn partafeløg, sbr. § 107 c" broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, sbr.§ 303 í vinnufelagslógini, sbr. § 107 c."

24) Í yvirskriftini undir Afsnit VII (frammanfyri Kapittul 16) verður „**almenn partafeløg**" broytt til: „**partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg**".

25) Yvirskriftin undir kapitel 16 (frammanfyri § 131) verður orðað soleiðis:
„**Gerð av hálvársfrásøgn fyri partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg**".

26) Í § 131, stk. 1, 1. pkt. verður „statslige aktieselskaber, jf. § 2 a, stk. 2, i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning" broytt til: „landspartafeløg, jvb. § 303 í vinnufelagslógini".

27) § 131, stk. 1, 3. pkt. verður strikað.

28) Í 131, stk. 2 verður „statslige aktieselskaber" broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb. § 303 í vinnufelagslógini".

29) Í § 134, nr. 4 verður „bestyrelsen" broytt til: „felagsins evsta leiðsla".

30) Í § 135, stk. 5, pkt. 1 verður „§ 1" strikað, og staðin verður sett: „stk. 1".

31) Í § 138, stk. 1 verður eftir 2. pkt. sett:
„Landsstýrismaðurin kann víkja frá freistini í 2. pkt. og áseta eina longri freist fyri virkir, ið eru fevnd av roknskaparflokki B og C, og sum lata inn ársfrágreiðingina elektróniskt eftir reglum, sum eru settar sambært § 155, stk. 2".

32) Í § 138, stk. 1, 3. pkt., ið verður 4. pkt., verður eftir „ikke“ sett: „meira“.

33) Í § 139, stk. 2 og § 154, stk. 1 verður „indledende og“ strikað.

34) Yvirskriftin framman fyri § 148 verður orðað soleiðis:
*„Innlatan av hálvársfrásøgn fyri partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb. § 303 í vinnufelagslógini“.*

35) Í § 148, stk. 1 verður „statslige aktieselskaber, jf. § 2 a, stk. 2, i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb § 303 í vinnufelagslógini“.

36) Í § 148 a, 3. pkt. verður „medlemmerne af virksomhedens bestyrelse og direktion“ broytt til: „limirnir í virkisleiðsluni“.

37) Í § 150, stk. 1, 1. pkt. verður „virksomhedens ledelse“ broytt til: „evsta virkisleiðslan“.

38) Í § 150, stk. 3 verður sett inn sum 4. pkt.:
„Um ársfrásøgn ella undantaksváttan hjá einum íognarfelag ella einum kommanditfelag, jvb. § 3, stk. 1, nr. 2 ikki er móttikin innan freistina, sum er nevnd í 1. pkt., kann Skráseting Føroya taka avgerð um at strika skrásetingina av íognarfelagnum ella kommanditfelagnum av listanum hjá skrásetingini yvir virkin feløg sambært reglunum um hetta í „lov om visse erhvervsdrivende virksomheder“.“

39) Í § 151, stk. 1, verða orðini „pålægger den færøske registreringsmyndighed“ strikað, og í staðin verður sett: „kann Skráseting Føroya“, og orðið „ansvarlige“ verður strikað.

40) § 153 verður orðað soleiðis:
„**§ 153.** Tá tað í hesi lóg ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð skal verða framd í seinasta lagi eitt ávíst tal av døgnum, vikum, mánaðum ella árum eftir, at ein nærri ásett hending hevur verið, verður freistin at fremja gerðina roknað frá degnum eftir, at henda hending hevur verið.
*Stk. 2.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í vikum, er freistin at fremja gerðina farin vikudagin eftir tann dag, tá hendingin var.
*Stk. 3.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í mánaðum, er freistin at fremja gerðina farin mánaðardagin eftir tann dag, tá ásetta hendingin var. Um ásetta hendingin var seinasta dagin í mánaðinum, ella um freistin gongur út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð seinasta dagin í mánaðinum, líkamikið hvussu langur mánaðurin er.
*Stk. 4.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í árum, er freistin at fremja gerðina farin ársdagin eftir tann dag, tá ásetta hendingin var.
*Stk. 5.* Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag skal gerðin fremjast í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir hetta.“

41) Í yvirskriftini undir kapitel 20 (oman fyri) § 154 verður „*statslige aktieselskaber*“ broytt til: „*partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb. § 303 í vinnufelagslógini*“.

42) Í § 154, stk. 1 og § 155, stk. 3 verður „aktieselskaber, der følger reglerne for statslige aktieselskaber, jf. § 2 a, stk. 2, i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb § 303 í vinnufelagslógini“.

43) Í yvirskriftini oman fyri § 158 verður „*statslige aktieselskaber*“ broytt til: „*partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, jvb. § 303 í vinnufelagslógini*“.

44) Í § 158 verður „statslige aktieselskaber, jf. § 2 a, stk. 2, i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „partafeløg, sum fylgja reglunum fyri landspartafeløg, sbr. § 303 í vinnufelagslógini“.

45) Í § 159, stk. 1 verður „statslige aktieselskaber, jf. § 2 a, stk. 2, i aktieselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „landspartafeløg,“ og „anpartsselskabsloven som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ verður strikað.

46) Í § 159 a, stk. 6, 4. pkt. verður „virksomhedens bestyrelse, direktion eller lignende ansvarligt organ“ broytt til: „limir í virkisleiðsluni“.

47) Í § 162, stk. 1 verður „bestyrelse, direktion eller lignende ansvarligt organ“ broytt til: „leiðsla“.

48) Fylgiskjal 1, A, nr. 4 verður orðað soleiðis:
„4. Landspartafeløg:
Eitt partafelag, har landið hevur sama samband til felagið, sum móðurfelag til dótturfelag, sbr. § 303, sbr. §§ 6 og 7 í vinnufelagslógini.“

49) Í fylgiskjali 1, A verður eftir nr. 4 sett:
„5. Virkisleiðslan:
Limirnir í teimum ábyrgdu leiðslustovnum, sum taka sær av ávikavist evstu leiðsluni og dagligu leiðsluni eftir teimum lógum, viðtøkum, avtalum ella siðvenjum, ið eru galdandi fyri virkið. Í virkjum, sum hava ein eftirlitsstovn ella eftirlitisráð, er eftirlitsstovnurin ella eftirlitisráðið

umfatað av teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri evstu leiðsluna. Er tað ikki ein serstøk leiðsla í virkinum, eru persónligu ábyrgdu eigararnir at meta sum ábyrgda leiðslan.“
Nr. 5 og 6 verða eftir hetta nr. 6 og 7.

50) Fylgiskjal 1, B verður orðað soleiðis:
„**B. Samtøkur v.m.**
1.Samtøka:
Eitt móðurvirki og øll dótturvirkir.

2. Móðurvirki:
Eitt virki, ið hevur avgerandi ávirkan á eitt ella fleiri dótturvirkir.
Eitt dótturvirki kann bert hava eitt beinleiðis móðurvirki. Um fleiri virkir lúka treytirnar í nr. 4, er tað bert tað virkið, sum veruliga kann útinna avgerandi ávirkan á virkisins fíggjarligu og rakstrarligu avgerðir, ið kann metast at vera móðurvirki.

3. Dótturvirki:
Eitt virki, har móðurvirkið hevur avgerandi ávirkan.

4. Avgerandi ávirkan í mun til eitt dótturvirki:
Avgerandi ávirkan er heimildin til at stýra fíggjarligum og rakstrarligum avgerðum.
Tað er avgerandi ávirkan í mun til eitt dótturvirki, tá móðurvirkið, beinleiðis ella óbeinleiðis gjøgnum dótturvirkið, eigur meira enn helvtina av atkvøðurættinum í einum virki uttan so, at tað í serligum føri greitt kann vísast á, at hesi eigaraviðurskifti ikki hava avgerandi ávirkan.
Um eitt móðurvirki ikki eigur meira enn helvtina av atkvøðurættinum í einum virki, er tað avgerandi ávirkan, um móðurvirkið hevur:
1) ræðisrætt yvir meira enn helvtini av atkvøðurættinum gjøgnum avtalu við aðrar íleggjarar,
2) heimild at stýra teimum fíggjarligu og rakstrarligu viðurskiftunum í einum virki sambært viðtøkum ella avtalu,
3) heimild at tilnevna ella seta frá meirilutan av limunum í evstu leiðsluni, og henda leiðsla hevur avgerandi ávirkanina í virkinum, ella
4) ræðisrættin yvir veruliga meirilutanum av atkvøðunum á aðalfundinum, ella í felagsstovni, ið sammetast kann við aðalfundin, og tískil hevur ta veruligu avgerandi ávirkanina í virkinum.

Møgulig atkvøðurættindi og virknaðurin av møguligum atkvøðurættindum, heruppií tekningarrættir og keypsoptiónir til kapitalpartar, sum beinleiðis kunnu nýtast ella leggjast um, skulu takast við í metingina um, hvørt eitt virki hevur avgerandi ávirkan.
Tá atkvøðurættir verða gjørdir upp í einum dótturvirki, skal síggjast burtur frá atkvøðurættindum, ið eru knýtt at kapitalpørtum, ið dótturvirkið ella dótturvirkir hennara eiga.

5. Assosierað virki:
Eitt virki, ið ikki er eitt dótturvirki, men í hvørjum eitt annað virki og tess dótturvirkir hava týðandi ávirkan á virkisins rakstarligu og fíggjarligu leiðslu. Eitt virki verður mett at hava týðandi ávirkan, um virkið og tess dótturvirkir saman eiga 20 prosent ella meira av atkvøðurættindunum.

6. Atknýtt virki:
Virkisins dótturvirki, tess móðurvirki og tess dótturvirki.“

50) Í *Fylgiskjali 2, 1. Skema fyri fíggjarstøðu í kontuformi* (roknskaparflokkur B, C og D), SKULD, EGINPENINGUR, IV. Annar tiltakspeningur, verður eftir nr. 2 sett:
„3. Tiltakspeningur fyri útlán og trygdarveiting.
4. Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan virkiskapital.“
Nr. 3-5 verða hereftir nr. 5-7.

52) Í Fylgiskjali 2, 2. Skema fyri fíggjarstøðu í frásagnarformi (roknskaparflokkur B, C og D), EGINOGN, IV. Annar tiltakspeningur, verður eftir nr. 2 sett:
„3.Tiltakspeningur fyri útlán og trygdarveiting.
4. Tiltakspeningur fyri ikki inngoldnan virkiskapital.“
Nr. 3-5 verða hereftir nr. 5-7.

**§ 2**

Í kongligari fyriskipan nr. 1114 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Allastaðni í lógini verður „Erhvervs- og selskabsstyrelsens edb-informationssystem“ og „styrelsens edb-informationssystem“ broytt til: „kt-skipan Skráseting Føroya“.

2) § 1, stk. 2, verður „lov om aktieselskaber som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning, lov om anpartsselskaber som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „vinnufelagslógin“

3) Í § 1, stk. 3, nr. 3 verður „lov om aktieselskaber § 2, stk. 2, jf. stk. 4 og 5, som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „§§ 6 og 7 í vinnufelagslógini“

4) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:

„*Stk. 2.* Eitt kommanditfelag er at skilja sum eitt virki, har ein ella fleiri luttakarar, nevndir komplementarar, hefta persónliga og uttan avmarking og, um teir eru fleiri, solidariskt fyri virkisins skyldum, meðan ein ella fleiri luttakarar, kallaðir kommanditistar, hefta avmarkað fyri virkisins skyldum. Fyri kommanditfeløg, sum eru stovnað eftir 1. januar 2008, skulu teir luttakarar, sum hefta uttan avmarking, hava fyrisitingarligar og fíggjarligar heimildir.“

5) Í § 3 verður sett sum 2. pkt.:
„Tað er harumframt ein treyt, at virkisluttakararnir ikki kunnu atkvøða og fáa vinning í mun til sín part av kapitalinum, og at møguleiki skal vera fyri skiftandi luttakaratali.“

6) §§ 10-17 verða strikaðar og í staðin verður sett:
„**§ 10.** Upplýsingar, sum skulu skrásetast eftir hesi lóg, skulu verða tiknar við í kt-skipan Skráseting Føroya í seinasta lagi 2 vikur eftir, at rættarstovnandi avgerðin er tikin, um ikki annað er ásett í hesi lóg. Um fráboðarin ikki sjálvur skipar fyri skrásetingini í kt-skipan Skráseting Føroya, skal fráboðan verða móttikin hjá Skráseting Føroya í seinasta lagi 2 vikur eftir, at rættarstovnandi avgerðin er tikin. Verða freistirnar í stk. 1 og 2 ikki hildnar, kann skráseting ikki verða framd.
*Stk. 2.* Skyldan at tryggja, at skráseting verður framd, ella at fráboðan við endamálinum at skráseta verður send Skráseting Føroya, er hjá høvuðsleiðslu felagsins.
*Stk. 3.* Stk. 1 og 2 verða at nýta á sama hátt fyri almannakunngering av skjølum og øðrum boðum v.m., sum skulu almannakunngerast í kt-skipan Skráseting Føroya.
*Stk. 4.* Virkið skal gera eina viðtøku, sum skal leggjast saman við fráboðanini um skráseting av stovnanini.

**§ 11.** Limirnir í leiðsluni í einum virki, sum er fevnt av hesi lóg, skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya. Somuleiðis skal skrásetast, hvør hevur tekningarrættin fyri virkið. Harumframt verða tiknar upp upplýsingar um navn virkisins, bústað, heimstaðarkommunu, endamál og roknskaparár. Skal virkið gera ársfrágreiðing eftir § 3, stk. 1, nr. 4 í ársroknskaparlógini, skal eisini navn grannskoðaranna takast við í skránna.
*Stk. 2.* Fráboðan um og broytingar viðvíkjandi einum møguligum aðalfundarvaldum grannskoðara, sum skal grannskoða ársfrágreiðingina, jvb. § 144 í vinnufelagslógini, skal verða skrásett í Skráseting Føroya. Um grannskoðaraskifti fer fram, áðrenn starvstíðin er endað, skal saman við fráboðanini vera ein gjøllig frágreiðing frá høvuðsleiðsuni um orsøkina til, at starvstíðin er endað.

**§ 12.** Eitt kommanditfelag ella eitt íognarfelag skal verða strikað í skránni hjá Skráseting Føroya, um

1) virkið boðar frá, at ein av íognarunum ávikavist komplementarunum ikki longur er kapitalfelag ella felag við samsvarandi rættarformi,
2) leiðsla ella grannskoðari ikki eru skrásett fyri eitt virki, og hesi viðurskifti ikki eru fingin í rættlag í seinasta lagi, tá ein freist, ásett av Skráseting Føroya, er farin, ella
3) leiðslan ikki hevur sent Skráseting Føroya ársfrágreiðing ella undantaksváttan eftir ásetingunum um hetta í ársroknskaparlógini.

*Stk. 2.* Gerst greitt, eftir at felagið er strikað, at tey viðurskifti, sum hava ført til, at felagið varð strikað, ikki longur eru galdandi, kann íognarfelagið ella kommanditfelagið, jvb. stk. 3, biðja Skráseting Føroya um at endurskráseta virkið. Skráseting Føroya kann áseta nærri reglur um endurskráseting av teimum virkjum, sum eru nevnd í stk. 3.
*Stk. 3.* Er eitt virki ikki longur fevnt av lógini, jvb. § 1, stk. 1, og verður tað ikki likviderað, jvb. § 20, skal hetta verða fráboðað eftir stk. 1. Saman við fráboðanini skal sendast ein váttan, gjørd av einum løggildum ella skrásettum gannskoðara, um, at virkið uttan iva er solvent. Skráseting Føroya strikar virkið, tá henda váttan er fingin til vega.

**§ 13.** Fráboðanir, roknskapir og onnur skjøl, sum Skráseting Føroya fær, og brøv, úrskriftir og onnur skjøl, sum Skráseting Føroya letur, kunnu vera bæði í pappírsformi og í elektróniskum formi, jvb. tó stk. 2. Uttan mun til formin, eru skjølini rættarliga javnmett. Har tað í hesi lóg verður kravt, at eitt skjal skal vera undirskrivað, kann hetta krav verða lokið við persónligari undirskrift, við maskinelt endurgivnari undirskrift ella við talgildum ella samsvarandi signaturi.
*Stk. 2.* Skráseting Føroya kann áseta reglur um

1) nýtslu, fráboðan og skráseting, undir hesum, hvørji viðurskifti fráboðari ella onnur, sjálvi kunnu ella skulu skráseta,
2) almannakunngering av skjølum og øðrum boðum, undir hesum hvørji skjøl v.m. fráboðari sjálvur kann ella skal skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya,
3) elektróniska innsendan av skjølum, sum Skráseting Føroya móttekur eftir hesi lóg, undir hesum, hvussu innsendanin fer fram, um krøv til nýttu elektrónisku skipanirnar og um nýtsluna av elektróniskum signaturi,
4) hvørjar upplýsingar, ið skulu almannakunngerast skjótast til ber,
5) um upplýsingarnar v.m. eru alment atkomuligar,
6) gjøld fyri fráboðan, fyri úrskriftir, fyri al-

mannakunngering, fyri nýtsluna av kt-skipan Skráseting Føroya og fyri rykkjaraskriv, um goldið verður ov seint, og
7) rindan av árligum gjaldi fyri umsiting av vinufelagarættarligu reglunum viðvíkjandi kapitaltapi v.m. og fyri veitingar, har serligur kostnaður ikki er ásettur.

**§ 14.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um málskrav til tey skjalprógv, ið verða latin inn í sambandi við skrásetingar ella fráboðanir í kapitalfeløgum.
*Stk. 2.* Skráseting Føroya ásetur reglur um, at sjálvboðin skráseting og almannakunngering av vinnufelagsupplýsingum kann fara fram á øllum almennum ES málium, umframt ta kravdu almannakunngeringina á einum av teimum málum, ið eru loyvd eftir stk. 1.
*Stk. 3.* Um samsvar ikki er millum tey skjøl og tær upplýsingar, sum verða kravd skrásett og fráboðað, jvb. stk. 1, og umsetingar av hesum, sum sjálvboðið eru umsettar og almannakunngjørdar, kann felagið ikki nýta umsetingina mótvegis triðjamanni. Triðimaður kann hinvegin gera tann sjálvbodna almannakunngjørda tekstin galdandi mótvegis felagnum uttan so, at prógvað verður, at triðimaður kendi ta útgávuna, ið var kravd skrásett og almannakunngjørd í kt-skipan Skráseting Føroya. § 12 er ikki galdandi fyri skjøl, ið sjálvboðin eru almannakunngjørd.

*Skráseting*

**§ 15.** Skráseting Føroya førir yvirlit yvir tey virkir, ið eru skrásett sambært hesi lóg. Skráseting og almannakunngering eftir hesi lóg fer fram í kt-skipan Skráseting Føroya.
*Stk. 2.* Upplýsingar, ið eru almannakunngjørdar í kt-skipanini, eru at meta sum kendar fyri triðjamanni. 1. pkt. er tó ikki galdandi fyri tiltøk, ið eru framd í seinasta lagi 16. dagin eftir almannakunngeringina uttan so, at prógvað verður, at triðimaður ikki hevur kunnað havt kunnleika til tey almannakunngjørdu viðurskiftini.
*Stk. 3.* So leingi almannakunngering í kt-skipanini ikki er farin fram, kunnu viðurskifti, ið skulu skrásetast og almannakunngerast, ikki gerast galdandi ímóti triðjamanni uttan so, at tað verður prógvað, at triðimaður hevði kunnleika til hesi viðurskifti. At tílík viðurskifti ikki eru almannakunngjørd forða ikki fyri, at triðimaður kann gera hesi galdandi.

**§ 15 a.** Skráseting er ikki loyvd, um tað, ið ætlandi skal skásetast, er í stríð við hesa lóg, reglur, ið eru ásettar við heimild í hesi lóg, ella eftir viðtøkum virkisins, ella um avgerðin, ið er grundarlag fyri skrásetingini, ikki er tikin í samsvari við ásetingar í hesi lóg, við reglur, ásettar við heimild í hesi lóg ella við tað, sum ásett er í viðtøkum felagsins.
*Stk. 2.* Tann, sum skrásetir viðurskifti í kt-skipan Skráseting Føroya, ella sum letur inn fráboðan um hesi viðurskifti til kt-skipan Skráseting Føroya, borgar fyri, at skrásetingin ella fráboðanin er lógliga framd, heruppií at hóskandi fulltrú er tøk, og at skjalprógvini í sambandi við skrásetingina ella fráboðanina eru galdandi.

**§ 15 b.** Verður Skráseting Føroya varug við, at skeivleikar eru viðvíkjandi viðurskiftum, ið eru fráboðað, og at hesir skeivleikar kunnu verða rættaðir við aðalfundaravgerð ella við avgerð høvuðsleiðslustovni virkisins, ásetur Skrásetingin eina freist at rætta viðurskiftini. Skráseting kann ikki verða framd, um slíkir skeivleikar ikki eru rættaðir, tá freistin er farin.
*Stk. 2.* Fráboðari skal hava skrivlig boð um, at skrásetingin ikki verður framd, og grundgeving fyri, hví so er.
*Stk. 3.* Verður Skráseting Føroya varug við, at ivamál er um ognarrættin til partarnar í einum virki við avmarkaðari ábyrgd, kann Skrásetingin avgera, at skrásetingar eftir § 12 ikki kunnu verða framdar, áðrenn greiða er fingin um hesi viðurskifti. Fráboðarin skal hava skrivlig boð um, at skrásetingin ikki verður framd, og grundgeving fyri, hví so er. Skráseting Føroya kann harumframt í kt-skipanini almannakunngera eina grundgeving fyri avgerð síni.
*Stk. 4.* Skráseting Føroya kann í teimum førum, ið eru fevnd av stk. 3, harumframt skráseta fráfaring leiðslunnar.

**§ 15 c.** Skráseting Føroya kann frá fráboðara krevja tær upplýsingar, ið eru neyðugar til tess at taka støðu til, um lógin og viðtøkur virkisins eru hildnar.
*Stk. 2.* Við skráseting og fráboðan eftir reglum, ásettar við heimild í hesum kapitli, kann Skráseting Føroya í upp til 3 ár eftir skrásetingardagsetingina krevja váttan fyri, at skrásetingin ella fráboðanin er lógliga framd. Skráseting Føroya kann í serligum førum krevja grannskoðanarváttan um, at fíggjarligu tiltøkini í sambandi við skrásetingina ella fráboðanina eru lóglig. Verða treytirnar eftir 1. og 2. pkt. ikki loknar, ásetur Skráseting Føroya eina freist at vátta hesi viðurskifti. Er tílík váttan ikki fingin til vega, áðrenn freistin er farin, kann skrásetingin skipa fyri, at virkið verður avtikið eftir ásetingunum í § 21.

**§ 15 d.** Upplýsingar um navn, starv el. yrki og bústað leiðslunnar skulu til eina og hvørja tíð síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya. Hetta er eisini galdandi fyri avtikin virkir. Skráseting Føroya kann áseta reglur um, at ávísar upplýsingar ikki skulu síggjast.
*Stk. 2.* Dagføringar av persónsupplýsingum eftir

stk. 1 halda uppat 10 ár eftir, at viðkomandi persónur ikki longur er skrásettur í einum virki, sum er skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya.

**§ 15 e.** Er nakar av teirri fatan, at ein skráseting er til skaða fyri viðkomandi, skal málið um løggildi skrásetingannar avgerast av dómstólinum.
*Stk. 2.* Sakarmál um hetta skal verða lagt móti virkinum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir almannakunngeringina av skrásetingini í kt-skipan Skráseting Føroya. Rætturin sendir Skráseting Føroya útskrift av dóminum, sum síðani í kt-skipan síni almannakunnger upplýsingar um úrslitið av málinum.
*Stk. 3.* Aðrar avgerðir, tiknar av Skráseting Føroya eftir lógini, ella eftir reglum, ásettar við heimild í lógini, kunnu kærast til Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.
*Stk. 4.* Avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir § 15b og avgerðir, sum eru tiknar í sambandi við, at farið er út um tær freistir, sum eru ásettar í § 10, stk. 2 og 4, og § 15b, umframt avgerðir eftir § 20 og § 21, stk. 1, kunnu tó ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

*Freistir*

**§ 16.** Tá tað í hesi lóg ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð kann ella skal fremjast eitt ávíst tal av døgum, vikum, mánaðum ella árum, áðrenn ein nærri ásett hending verður, verður freistin at fremja gerðina roknað frá degnum fyri hesi nærri ásettu hending.
*Stk. 2.* Um freistin at fremja gerðina gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, skal gerðin fremjast í seinasta lagi seinasta gerandisdag frammanundan.
*Stk. 3.* Tá tað í hesi lóg, ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð ella ein avgerð í fyrsta lagi kann verða framd eitt ávíst tal av døgum, vikum, mánaðum og árum eftir, at ein nærri ásett hending er farin fram, verður freistin at fremja gerðina ella avgerðina roknað frá degnum eftir hesa nærri ásettu hending. Gerðin ella avgerðin kann í fyrsta lagi verða framd dagin eftir, at freistin er farin.

**§ 16 a.** Tá tað í hesi lóg ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð skal verða framd í seinasta lagi eitt ávíst tal av døgnum, vikum, mánaðum ella árum eftir, at ein nærri ásett hending hevur verið, verður freistin at fremja gerðina roknað frá degnum eftir, at henda hending hevur verið.
*Stk. 2.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í vikum, er freistin at fremja gerðina farin vikudagin eftir tann dag, tá hendingin var.
*Stk. 3.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í mánaðum, er freistin at fremja gerðina farin mánaðardagin eftir tann dag, tá ásetta hendingin var. Um ásetta hendingin var seinasta dagin í mánaðinum, ella um freistin gongur út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð seinasta dagin í mánaðinum, líkamikið hvussu langur mánaðurin er.
*Stk. 4.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í árum, er freistin at fremja gerðina farin ársdagin eftir tann dag, tá ásetta hendingin var.
*Stk. 5.* Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, skal gerðin fremjast í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir hetta.“

7) Í § 20 verður „kapitel 14 i lov om aktieselskaber som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „kapittul 14 í vinnufelagslógini“.

8) Í § 21, stk. 1 verður „§ 11, stk. 2, 2. pkt.,“ broytt til: „§ 12, stk. 2, 2. pkt.“

9) Í § 21, stk. 2, verður „§ 117 i lov om aktieselskaber som ikraftsat på Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „§§ 226-229 í vinnufelagslógini“

10) Í § 21 a, stk. 2 verður „aktieselskabslovens kapitel 15 som ikraftsat på Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „tær reglur í kapittli 15 í vinnufelagslógini, sum galda fyri smápartafeløg“.

11) Í § 21 b, stk. 2, verður „aktieselskabslovens kapitel 15 som ikraftsat på Færøerne ved kongelig anordning“ broytt til: „tær reglur í kapittli 15 í vinnufelagslógini, sum galda fyri smápartafeløg“.

12) Í § 23, stk. 1 verður „§§ 11 og 12“ broytt til: „§§ 12 og 15 c.“

**§ 3**

Í kongligari fyriskipan nr. 1113 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Allastaðni í lógini verða „Erhvervs- og Selskabsstyrelsens edb-informationssystem“ og „styrelsens edb-informationssystem“ broytt til: „kt-skipan Skráseting Føroya“.

2) Í § 1, stk. 2, nr. 3 verður „lov om aktieselskaber som ikraftsat for Færøerne § 2, stk. 2, jf. stk. 4 og 5“ broytt til: „§§ 3 og 4 í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagslógin)“.

3) § 22, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 22.** Ásetingarnar í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og reglur, settar við heimild í hesi lóg, um val av starvsfólkaumboðum, verða at nýta samsvarandi fyri ein vinnurekandi grunn og dótturfeløg hansara við neyðugum tillagingum. Landsstýrismaðurin kann í hesum sambandi gera serligar reglur fyri felaga- og samtøkuumboðan í vinnurekandi grunnum. Starvsfólkavaldir nevndarlimir luttaka bert í málum, sum ikki viðvíkja virkinum, um so er, at hetta er ásett í viðtøkunum. Í tann mun nýggir nevndarlimir skulu tilnevnast av nevndini, luttaka starvsfólkavaldu nevndarlimirnir ikki í tilnevningini uttan so, at annað er ásett í viðtøkunum."

4) Í § 50, stk. 2, verður „kapitel 15 i lov om aktieselskaber som ikraftsat for Færøerne ved kongelig anordning" broytt til: „15. kapittul í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg".

5) § 53 a verður orðað soleiðis:
„**§ 53 a.** Tá tað í hesi lóg ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð kann ella skal fremjast ávíst tal av døgum, vikum, mánaðum ella árum, áðrenn ein nærri hending verður, verður freistin at fremja gerðina roknað frá degnum fyri hesi nærri ásettu hending.
*Stk. 2.* Um freistin at fremja gerðina gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, flaggdag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, skal gerðin fremjast í seinasta lagi seinasta gerandisdag frammanundan.
*Stk. 3.* Tá tað í hesi lóg ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð ella ein avgerð í fyrsta lagi kann verða framd eitt ávíst tal av døgum, vikum, mánaðum og árum eftir, at ein nærri ásett hending er farin fram, verður freistin at fremja gerðina ella avgerðina roknað frá degnum eftir hesa nærri ásettu hending. Gerðin ella avgerðin kann í fyrsta lagi verða framd dagin eftir, at freistin er farin."

6) Eftir § 53 a verður sett:
„**§ 53 b.** Tá tað í hesi lóg, ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð skal verða framd í seinasta lagi eitt ávíst tal av døgnum, vikum, mánaðum ella árum eftir, at ein nærri ásett hending hevur verið, verður freistin at fremja gerðina roknað frá degnum eftir, at henda hending hevur verið, jvb. stk. 2-4.
*Stk. 2.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í vikum, er freistin at fremja gerðina farin vikudagin eftir tann dag, tá hendingin var.
*Stk. 3.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í mánaðum, er freistin at fremja gerðina farin mánaðardagin eftir tann dag, tá hendingin var. Um hendingin var seinasta dagin í mánaðinum, ella um freistin gongur út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð seinasta dagin í mánaðinum, líkamikið hvussu langur mánaðurin er.
*Stk. 4.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í árum, er freistin at fremja gerðina farin ársdagin eftir tann dag, tá hendingin var.
*Stk. 5.* Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, skal gerðin fremjast í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir hetta."

7) § 56, stk. 3 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Skráseting Føroya kann avgera, at skráseting og almannakunngering skal fara fram í kt-skipan Skráseting Føroya. Upplýsingar, sum eru almannakunngjørdar í kt-skipanini, verða mettar at vera komnar til kunnleika hjá triðjamanni."

## § 4

Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (grannskoðaralógin) verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 13, stk. 5 verður eftir 2. pkt sum nýtt 3. pkt. sett:
„Í feløgum við tvístreingjaðari leiðslu verða 1. og 2. pkt. nýtt samsvarandi fyri høvuðsleiðsluna og limir í eftirlitsráðnum."

2) Í § 20 verður eftir stk. 3 sett:
„*Stk. 4.* Í feløgum við tvístreingjaðari leiðslu fevnir virkisins leiðsla bæði um limir í høvuðsleiðsluni og limir í eftirlitsráðnum."

3) § 29, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
„Í grannskoðanarbólkinum skulu vera persónar, sum eru limir í eftirlitsráðnum ella í nevndini, sum ikki samstundis eru í stjórnini."

4) § 29, stk. 3-6 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Í virkjum, sum hava sett ein grannskoðanarbólk, skal uppskotið hjá evstu leiðsluni um val av grannskoðara vera grundað á eitt tilmæli frá grannskoðanarbólkinum.
*Stk. 4.* Virkir, sum stk. 1, 1. pkt. fevnir um, kunnu tó velja at lata samlaðu evstu leiðsluna útinna virksemið hjá grannskoðanarbólkinum. Hetta er tó treytað av, at eingin nevndarlimur samstundis er limur í stjórnini, og í minsta lagi ein limur í evstu leiðsluni bæði er óheftur av virkinum og hevur førleikar innan roknskap ella grannskoðan.
*Stk. 5.* Hóast ásetingina í stk. 4 kunnu virkir, ið eru fevnd av stk. 1, 1. pkt., velja at lata samlaðu evstu leiðsluna útinna virksemið hjá grannskoðanarbólkinum, um nevndarformaðurin ikki er limur í stjórnini, og um virkið í tveimum fylgjandi roknskaparárum á javnatíðspunktinum ikki fer upp um tvær av hesum treytum:
1) 250 starvsfólk í fulltíðarstarvi,

2) ein javna upp á 43 mió. evrur ella
3) ein nettoumsetning upp á 50 mió. evrur.
*Stk. 6.* Í virkjum, har tann samlaða evsta leiðslan fremur virksemi hjá grannskoðanarbólkinum, sbr. stk. 4 og 5, skal hetta standa í ársfrásøgnini."

5) § 50 verður orðað soleiðis:
„**§ 50.** Tá tað í hesi lóg ella í reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, er ásett, at ein gerð skal verða framd í seinasta lagi eitt ávíst tal av døgnum, vikum, mánaðum ella árum eftir, at ein nærri ásett hending hevur verið, verður freistin at fremja gerðina roknað frá degnum eftir, at henda hending hevur verið, jvb. stk. 2-4.
*Stk. 2.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í vikum, er freistin at fremja gerðina farin vikudagin eftir tann dag, tá hendingin var.
*Stk. 3.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í mánaðum, er freistin at fremja gerðina farin mánaðardagin eftir tann dag, tá hendingin var. Um hendingin var seinasta dagin í mánaðinum, ella um freistin gongur út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð seinasta dagin í mánaðinum, líkamikið hvussu langur mánaðurin er.
*Stk. 4.* Er freistin, jvb. stk. 1, ásett í árum, er freistin at fremja gerðina farin ársdagin eftir tann dag, tá hendingin var.
*Stk. 5.* Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, skal gerðin fremjast í seinasta lagi fyrsta gerandisdag eftir hetta."

**§ 5**

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 3, § 22, stk. 6 verður „partafelagslógini" broytt til: „vinnufelagslógini".

2) Í § 4, stk. 2 verður „partafelagslógini" broytt til: „vinnufelagslógini" og „§ 49, stk. 3, í partafelagslógini" broytt til: „§ 141 í vinnufelagslógini".

3) § 5, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
„5) **Móðurfelag:**
Eitt felag, sum hevur eitt ella fleiri dótturfeløg."

4) § 5, stk. 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:
„2) **Dótturfelag:**
Eitt felag, har eitt móðurfelag hevur avgerandi ávirkan."

5) § 5, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis:
„3) **Samtøka:**
Eitt móðurfelag og dótturfeløg hjá hesum, jvb. § 5 a."

6) § 5, stk. 6 verður strikað, og stk. 7 og 8 verða stk. 6 og 7.

7) Eftir § 5 verður sett:
*„Samtøkur*
**§ 5 a.** Eitt móðurfelag er saman við einum ella fleiri dótturfeløgum ein samtøka. Eitt felag kann bert hava eitt beinleiðis móðurfelag. Um fleiri feløg lúka eina ella fleiri av treytunum í § 5 b, er tað bert tað felagið, ið veruliga útinnir avgerandi ávirkanina á fíggjar- og rakstrarligu avgerðir felagsins, ið verður roknað sum móðurfelag.

**§ 5 b.** Avgerandi ávirkanin er at skilja sum heimildin at stýra fíggjarligum og rakstrarligum avgerðum hjá einum dótturfelag.
*Stk. 2.* Tað er avgerandi í mun til eitt dótturfelag, tá móðurfelagið, beinleiðis ella óbeinleiðis gjøgnum dótturfelagið, eigur meira enn helvtina av atkvøðurættinum í einum felag uttan so, at tað í serligum føri greitt kann vísast á, at hesi eigaraviðurskifti ikki hava avgerandi ávirkan.
*Stk.3.* Um eitt móðurfelag ikki eigur meira enn helvtina av atkvøðurættinum í einum felag, er tað avgerandi ávirkan, um móðurfelagið hevur:
1) Ræðisrætt yvir meira enn helvtini av atkvøðurættinum gjøgnum avtalu við aðrar íleggjarar,
2) heimild at stýra teimum fíggjarligu og rakstrarligu viðurskiftunum í einum felag sambært viðtøku ella avtalu,
3) heimild at tilnevna ella seta frá meirilutan av limunum í evstu leiðsluni, og henda leiðsla hevur avgerandi ávirkanina í felagnum, ella
4) ræðisrættin yvir faktiska meirilutanum av atkvøðunum á aðalfundinum, ella í felagastovni, ið sammetast kann við aðalfundin, og tískil hevur ta veruligu avgerandi ávirkanina í felagnum.
*Stk. 4.* Møgulig atkvøðurættindi og virknaðurin av møguligum atkvøðurættindum, heruppií tekningarrættir og keypsoptiónir til kapitalpartar, sum beinleiðis kunnu nýtast ella leggjast um, skulu takast við í metingina um, hvørt eitt felag hevur avgerandi ávirkan.
*Stk. 5.* Tá atkvøðurættir verða gjørdir upp í einum dótturfelag, skal síggjast burtur frá atkvøðurættindum, ið eru knýtt at kapitalpørtum, ið dótturfelagið ella dótturfeløg tess eiga."

8) Í § 7, stk. 4 verður „§ 153, stk. 2-6 í partafelagslógini" broytt til: „§ 27, stk. 2, §§ 28-30 og § 299 í partafelagslógini".

9) Í § 8 verður sum stk. 2 sett:
*„Stk. 2.* Tryggingarfeløg, nevnd í stk. 1, skulu hava nevnd og stjórn."

10) § 9 verður orðað soleiðis:
**„§ 9.** Partapeningurin í tryggingarfeløgum skal allur verða fult inngoldin. Immateriel ogn kann ikki verða nýtt til tess at gjalda partapening í tryggingarfelagnum.“

11) Eftir § 9 verður sum stk. 2 sett:
*„Stk. 2.* Í tryggingarfeløgum kann partapeningurin ikki uppbýtast í partabrævaflokkar við ymiskum atkvøðuvirði.“

12) Í § 9 verður sum stk. 3 sett:
*„Stk. 3.* Eitt fíggjarfelag kann ikki ímóti viðurgjaldi til ognar ella sum pant ogna sær egin partabrøv, um áljóðandi virðið av samlaðu innistøðuni av partabrøvum hjá felagnum og tess dótturfeløgum við hesum fer upp um 10%. Upp í loyvdu innistøðuna av egnum partabrøvum verða roknað partabrøv, sum triðipersónur hevur ognað sær í egnum navni, men fyri rokning felagsins.“

13) Í § 17, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2 verður „partafelagslógini“ broytt til: „vinnufelagslógini“.

14) Í § 17, stk. 1, 1. pkt. verður „§§ 3-13 í partafelagslógini“ broytt til: „kapittul 3 í vinnufelagslógini“.

15) Í § 17, stk. 2 verður „partafelagslógini“ broytt til: „vinnufelagslógini“.

16) § 17, stk. 3 verður strikað.

17) Í § 51 verður „§ 60, stk. 2 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 135, stk. 2 í vinnufelagslógini“.

18) Í § 53 verður „§ 72, stk. 2 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 92, stk. 2 og 3 í vinnufelagslógini“.

19) Í § 58, stk. 1, pkt. 3 verður „at vera til staðar“ broytt til: „at luttaka“.

20) Í § 63 verður „partafelagslógini“ broytt til: „vinnufelagslógini“.

21) Í § 67, stk. 1 verður „§ 43 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 178 í vinnufelagslógini“.

22) Í § 67, stk. 2 verður „§ 48 a í partafelagslógini“ broytt til: „§ 199 í vinnufelagslógini“.

23) Í § 69, stk. 1 verður „§ 4 í partafelagslógini“ broytt til: „§§ 25 og 26 í vinnufelagslógini“.

24) Í 70, stk. 1 verður „§ 38 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 159 í vinnufelagslógini“.

25) § 71, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„Við teimum tillagingum og frávikum, sum ganga fram av ásetingunum í hesi lóg, verða §§ 86 og 87, § 88, stk. 1 og 3, §§ 92 og 93, 95, 100-102 og 104, § 111, stk. 1, nr. 1 og stk. 2 og 4, §§ 112-122, 124-127, 128, 131, 133-141, 143 og 309 í vinnufelagslógini at nýta samsvarandi fyri sínámillum tryggingarfeløg.“

26) Í 71, stk. 3 verður „§ 65, stk. 2, § 66, § 71, § 73, stk. 6, § 74, § 75, stk. 1 og 3, § 76, stk. 2, § 80 og § 81 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 76, stk. 5, § 79, stk. 1-4, § 80, § 89, stk. 1 og 2, § 90, § 97, § 100, § 101, stk. 1 og 2, §§ 107, 108, 125 og 126 í vinnufelagslógini“.

27) Í § 71, stk. 5 verður „§§ 112 og 113 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 180, stk. 1, og § 194 í vinnufelagslógini“.

28) Í § 73, stk. 2 verður „§ 49, stk. 6 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 120, stk. 1 og 3 í vinnufelagslógini“.

29) Í § 127, stk. 8 verður „§§ 82-85 í partafelagslógini“ broytt til: „§§ 144-149 í vinnufelagslógini“.

30) Í § 129 verður sum nýtt stk. 2 sett:
*„Stk. 2.* § 242, pkt. 2, § 256, pkt. 3, § 257, stk. 2, § 260, pkt. 2, § 277, pkt. 2, § 294, stk. 2, og § 297, pkt. 2 í vinnufelagslógini verða at nýta samsvarandi fyri samanleggingar, fevndar av stk. 1.“
Stk. 2-7 verða eftir hetta stk. 3-8.

31) Í § 129, stk. 2, sum verður stk. 3, verður „kapitli 15 í partafelagslógini“ broytt til: „kapitli 15 í vinnufelagslógini“.

32) Í § 129, stk. 4, sum verður stk. 5, verður „stk. 3“ broytt til: „stk. 4“.

33) § 129, stk. 7, sum verður stk. 8, verður orðað soleiðis:
*„Stk. 8.* Samanleggingarætlanir, kloyvingarætlanir og váttan frá metingarfólkunum eftir § 242 og § 243 í vinnufelagslógini skulu fyri tryggingarfeløg í seinasta lagi 4 vikur eftir, at samanleggingarætlanin er undirskrivað, verða send Tryggingareftirlitinum, sum almannakunnger samanleggingarætlanina, kloyvingarætlanina og váttanina hjá metingarfólkunum.“

34) Í § 130, stk. 1 verður „§§ 134 a-134 k í partafelagslógini“ broytt til: „§§ 237-253 og 271-290 í vinnufelagslógini“.

35) Í § 130, stk. 2 verður „§ 134 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 236 í vinnufelagslógini“.

36) Í § 136, stk. 1 verður „§ 116, stk. 1, í parta-

felagslógini“ broytt til: „§ 217 í vinnufelagslógini“.

37) Í § 148, stk. 1 verður „Kapittul 14 í partafelagslógini“ broytt til: „Kapittul 14 í vinnufelagslógini“.

38) Í § 161, stk. 1 verður „§ 3 í partafelagslógini“ broytt til: „§§ 21 og 22 í vinnufelagslógini“.

39) Í § 168, stk. 2 verður „sbr. partafelagslógina § 109a, stk. 3, nr. 1,“ broytt til: „jvb. § 183, stk. 2 í vinnufelagslógini“.

40) Í § 173, stk 1 verður „harumframt reglurnar í partafelagslógini §§ 3 og 5, § 6, stk. 1 og 3-5, §§ 7-10 og § 11, stk. 1 og 3“ strikað.

41) § 174, stk. 2-5 og §§ 175, 176 og 178 verða strikaðar.

42) Í § 205, stk. 1 verður „§ 33 a í partafelagslógini“ broytt til: „§ 161 í vinnufelagslógini“.

43) Í § 215, stk. 1 verður „§ 52, stk. 1 í partafelagslógini“ broytt til: „§ 112 í vinnufelagslógini“.

**§ 6**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

Tórshavn, 27. mai 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 43/2010

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705